# Sansir í nýggj hús

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, seinni hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, partvís vátaslettingur ella kavi, men eisini sólglottar. Hitin fellur niður í 1 til 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin andøvsgul av útsynningi og regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, seinni hækkar hann upp í útnyrðing. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 6 og 10 stig.



### INNFLYTING

*Ingrid Bjarnastein*

Reklamuhúsið Sansir flytir nú inn í Tinghúsveg 47. Húsini eru í trimum hæddum, og er hvør hæddin 91 $m^2$.

Loftshæddin er øll innrættað sum teknistova, og tað er har øll tey kreativu fólkini sita. Á miðhæddini er fundarhøli og umsiting, og í kjallaranum er ein kantina og bókhaldið.

Møguleiki er fyri einum rúmi afturat í kjallaranum, og møguliga kemur internetmaðurin at halda til har, men hetta er ikki rættiliga komið uppá pláss enn, sigur Høgni Rasmussen frá Sansum.

– Vit eru sera væl nøgdir við nýggju hølini, fortelur Høgni Rasmussen. – Eg má siga, at eg havi sjálvur ongantíð arbeitt undir so góðum umstøðum fyrr. Tað mangla onkur smáting, men sum heild eru vit ógvuliga væl nøgdir.

Reklamuhúsið Sansir hevur annars hildið til uppi á Hálsi har Meinhard Arge var fyrr. Men nú hava teir endiliga fingið sínu egnu hølir.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | ÷1 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 19 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 27 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Írland kemur móti Føroyum og dýpist.




Lágtrýstið við Føroyar fer í landnyrðing og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/10 kl. 06[00]– 25/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 4,6 mm – mált frá 24/10 kl. 06[00]– 25/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 112,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

24. okt.: Fyrra kvarter
26. okt.: Mánin longst frá jørðini
1. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. okt | 03.35 | 15.56 | 02.35 | 14.56 | 02.50 | 15.11 | 05.35 | 17.56 | 06.35 | 18.56 | 01.50 | 14.11 | 00.50 | 13.11 | 03.50 | 16.11 | 04.50 | 17.11 | 03.20 | 15.41 | 04.35 | 16.56 |
| 27. okt | 04.18 | 16.37 | 03.18 | 15.37 | 03.33 | 15.52 | 06.18 | 18.37 | 07.18 | 19.37 | 02.33 | 14.52 | 01.33 | 13.52 | 04.33 | 16.52 | 05.33 | 17.52 | 04.03 | 16.22 | 05.18 | 17.37 |
| 28. okt | 03.54 | 16.12 | 02.54 | 15.12 | 03.09 | 15.27 | 05.54 | 18.12 | 06.54 | 19.12 | 02.09 | 14.27 | 01.09 | 13.27 | 04.09 | 16.27 | 05.09 | 17.27 | 03.39 | 15.57 | 04.54 | 17.12 |
| 29. okt | 04.30 | 16.48 | 03.30 | 15.48 | 03.45 | 16.03 | 06.30 | 18.48 | 07.30 | 19.48 | 02.45 | 15.03 | 01.45 | 14.03 | 04.45 | 17.03 | 05.45 | 18.03 | 04.15 | 16.33 | 05.30 | 17.48 |

5 707265 100050 >